ítróttur

Nr. 218 • leygardagur • 11. november 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Fri›arligt vikuskifti

Bert tríggir hondbóltsdystir ver›a leiktir hetta vikuskifti› í fremstu hondbóltsrø›unum hjá kvinnum og monnum

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Eftir at vit nú í fleiri vikuskifti hava uppliva› eina rúgvu av bæ›i spennandi og gó›um dystum, er nú líkt til, at talan ver›ur um eitt fri›arligt vikuskifti. Ikki tí, dystirnir, sum ver›a leiktir, kunnu saktans gerast spennandi, men tali› av dystum er ta› higartil minsta, sum hevur veri› eitt vikuskifti.

Hvør fylgir vi›

Hjá kvinnunum er bert ein dystur, men harafturímóti eru útlit fyri, at hesin kann gerast heilt spennandi hjá ásko›arunum.

Ta› eru VB og Neistin, sum hittast, og í øllum førum á pappírinum tykjast li›ini at vera sera jøvn.

Í fjør hev›i Neistin taki› á VB í landskappingini, men hvørja fer› vóru dystirnir tættir, og hetta var eisini galdandi, tá VB vann á Neistanum í hálvfinaluni í steypakappingini.

VB li›i› er rigga› til vi› enn einum útlendskum leikara, og er tí kanska betri fyri enn í fjør, men í øllum førum er ein leikari á neistali›num, sum hevur naka› at prógva›.

Inga F. Danberg kann loksins vera vi› li›feløgunum á vøllinum, so í veruleikanum er talan um fyrstu fer› í ár, at neistali›i› fer heilskapa› á vøllin. Hvørt hetta ver›ur nóg miki› til at koppa VB fer bert tí›in at vísa.

Eysturoyararmarnir bresta saman

Hjá monnunum eru tveir dystir. Á Skála hittast StÍF og Tjaldur, me›an KÍF tekur ímóti Neistanum í Kollafir›i.

Var ta› fyri einum ári sí›ani, hev›i neyvan veri› anak› ivamál um favorittheiti›, men undan sunnudegnum tykist hetta ikki heilt so upplagt.

Tjaldur tykist nú at hava fingi› fótin fyri seg, og óast StÍF kanska er ein heldur stórur biti, so kunnu teir av eystara armi gera ein vørr, um lagi› er hitt rætta. Hinvegin er ta› ein treyt hjá StÍF, at dysturin gevur tvey stig, um teir skulu síggja sær nakra vón í strí›num móti VÍF.

Kollfir›ingar hava higartil havt eitt heldur svikaligt kappingarár. Spæli› hevur veri› á eini lei›, men aloftast er ta› bara vor›i› til líka vi› og næstan, og so er ikki meira hent.

Einasta stigi› higartil fingu teir, tá teir vóru óhepnir ikki at vinna móti Kyndli, men eitt nú móti Neistanum s‡ndu teir eisini gó›ar taktir. Í øllum førum fyrra hálva tíman.

Neistin tykist so avgjørt at vera til at tosa vi› í løtuni, og tí eru útlitini hjá KÍF undan dystinum kanska slettis ikki so galin. Hinvegin eru havnarmenninir tvinga›ir til at vinna, um teir ætla sær naka› sum helst hetta kappingarári›, og undir øllum umstø›um, so liggur tr‡sti› á verandi føroyameistarunum, so leingi teir hava hetta heiti›.


Spennandi ver›ur at vita, hvørt Tjaldur megnar at halda fast um framgongdina, sum var so sjónlig fyri viku sí›ani

Stø›an 1. Deild kvinnur

	dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 VÍF	6	5 - 1 - 0	174	92	82	11
2 Stjørnan	6	5 - 1 - 0	172	137	35	11
3 Kyndil	5	3 - 0 - 2	123	130	-7	6
4 VB	4	2 - 0 - 2	117	86	31	4
5 Neistin	5	2 - 0 - 3	108	118	-10	4
6 Sóljan	6	1 - 0 - 5	127	157	-30	2
7 Tjaldur	6	0 - 0 - 6	94	195	-101	0

Stø›an 1. Deild menn

	dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 VÍF	7	7 - 0 - 0	238	170	68	14
2 StÍF	6	4 - 1 - 1	181	139	42	9
3 Kyndil	6	2 - 2 - 2	167	154	13	6
4 Neistin	6	3 - 0 - 3	145	154	-9	6
5 H71	7	3 - 0 - 4	193	203	-10	6
6 Tjaldur	6	1 - 0 - 5	128	204	-76	2
7 KÍF	6	0 - 1 - 5	133	161	-28	1

Fult flogbóltsvikuskifti›

Í mun til hondbóltin, er framvegis full fer› á flogbóltinum, og um vikuskifti› ver›a fimm dystir leiktir í fremstu deildunum

FLOGBÓLTUR
Jákup Mørk

Eins og vanligt, so sn‡r ta› seg um tríggjar dystir í bestu kvinnudeildini, me›an mansdeildin bert hevur tveir dystir, tí tali› av li›um bert er fimm.

Oddadystur á Giljanesi

Mest áhugaverdi dysturin hjá kvinnunum er helst tann á Giljanesi, har Dráttur tekur ímóti Mjølni.

Li›ini eru tey bæ›i fremstu í deildini, og takka veri› einum 3-2 sigri á Drátti í Klaksvík, eru ta› klaksvíkskvinnurnar, sum eru stavnin frammanfyri. Í tí dystinum var Dráttur annars á odda 2-0, so einki er at ivast í, at tær ætla sær hevnd hesu fer›. Naka› sum eisini er ney›ugt, um gloppi› uppeftir ikki skal gerast ov stórt.

Hesin dysturin ver›ur leiktur sunnudagin, men longu leygardagin ver›a tveir a›rir dystir leiktir.

Á Kambsdali spæla ÍF og Fossanes, me›an Fleyr og TB skulu takast í Gundadalshøllini. Í fyrrnevndu uppger›ini er ÍF helst favorittur. Tær vunnu trygt útidystin móti teimum av Fossanesi, men hinvegin er tr‡st nú um at koma á Fossanes, sum helst ikki vil fara beina lei› ni›ur aftur í næstbestu deildina.

Dystin í Havn vilja tvørágentur uttan iva vinna, so tær kunnu toga seg nærri ovaru sessunum, solei›is at ta› í øllum førum ver›ur hildi› fast í bronsumerkjunum. Hinvegin skal Fleyr skjótt til at prógva, at ta› hóast alt ikki stendur so illa til hjá teimum, sum nógv vilja hava ta› til.

Lokaluppger›

Hjá monnunum tykist mest áhugaverdi dysturin at vera í Havn, har Fleyr og Fram bresta saman.

Í fyrra dystinum vann Fram, sum eisini er á odda í meistaradeildini, og vi› fyrrverandi Fleyr venjaranum á odda, tykjast teir hjá Fram eisini at vera sera væl fyri.

Fleyr hevur hinvegin sítt at prógva, og skulu teir verandi meistararnir á nakran hátt standa seg í oddastrí›num, er helst ney›ugt vi› einum sigri her.

Hesum høvdu klaksvíkingar helst einki havt ímóti. Teir eru í løtuni á ø›rum plássi. Tvey stig aftan fyri Fram, go megna teir at vinna í Sørvági, eru teir í øllum førum vísir í, at munurin ikki økist. Fyritreytirnar fyri hesum munnu eisini vera á eini lei›, tí einki er at ivast í, at Mjølnir hevur sterkari og brei›ari hóp enn ungu sørvingarnir, sum als ikki eru komnir í gongd í ár.

Stø›an, meistaradeild, kvinnur

	d	v	t	Vunnin sett	Tapt sett	Sett-munur	stig
1 Mjølnir	4	4 -	0	12	2	10	8
2 Dráttur	4	3 -	1	11	4	7	6
3 TB	4	2 -	2	7	7	0	4
4 Fleyr	4	2 -	2	7	7	0	4
5 ÍF	4	1 -	3	4	9	-5	2
6 Fossánes	4	0 -	4	0	12	-12	0

Stø›an, meistaradeild, menn

	d	v	t	Vunnin sett	Tapt sett	Sett-munur	stig
1 Fram	3	3 -	0	9	3	6	6
2 Mjølnir	3	2 -	1	8	4	4	4
3 ÍF	3	2 -	1	7	4	3	4
4 Fleyr	3	1 -	2	4	7	-3	2
5 SÍ	4	0 -	4	2	12	-10	0

VI‹MERKINGAR

Maria Oknadal

f. 3. august 1918 – d. 22. okt. 2000

Stillføra og drúgva strí›skvinnan

Í farnu viku fór Maria seinastu fer› sína um Skopunarfjør›. Fer›in hon gjørdi allar ársins tí›ir – um ta› var klúgvandi – til hon nærka›ist teimum áttati. Ólønta arbei›i hennara ste›ga›i ikki, tá hon var› 67 ár. Hon stríddist fyri lívskorum Gu›s minstu smáu, teimum, i› sjálv ikki vóru ment at tosa søk sína og teirra avvar›andi, – tey, i› ver›a ráma› av tí, vit øll vóna, bert rámar hini. Lívi› hjá Mariu gjørdist partur av søguni hjá nøkrum av felagsskapum teirra breka›u í Føroyum.

Lagnan var Mariu hør›, men vistu tú ta› ikki, so gruna›i tú ikki, at henda fatta og viljafasta kvinna frá bestu árum hev›i tungar dagar. Hon misti børn sum smá, hon fekk børn vi› truplum breki, og hon misti raskan son, i› doy›i frá børnum og konu, á›renn hann var 30. Og hon gjørdist einkja í bestu árum. Sálarlig styrki og álit á Hin almáttuga hjálptu henni framá.

Maria stríddist millum anna› fyri at fáa tey breka›u heimaftur, sum vóru send í útlegd. Hetta gekk ikki sum eftir ánni. Her vóru nógar og tí›arkrevjandi for›ingar og vónbrot. Hon og ma›urin Klæmunt vóru millum fremstu eldsálirnar og stigtakararnar til felagi› JAVNA. Felagi›, i› fekk stóra undirtøku millum manna og nógv á skafti.

Tá tey breka›u umsí›ir komu heim á Eirargar› at búgva, var tí› uppá seta skjøtil á arbei›i fyri smærri eindum, har búfólkini kundu fáa ta lívsdygd, i› liggur í at búleikast í einum umhvørvi so nær einum vanligum heimi sum gjørligt. Maria arbeiddi ótroyttilig í nevndini í JAVNA, í MBF og í Deyvafelagnum. Hev›i tú hug at bi›ja hana minka fer›ina, tí nú var eisini tí› hjá henni at seta seg afturá, helt hon fyri, at tí›in var knøpp, og at stundir vóru ikki til at taka sær av løttum. Illgongt var og tí›arkrevjandi at koma á mál, men hon dugdi at gle›ast um øll framstig á lei›ini. Vit møttust tí›liga í tí›ini og gjørdist vinkonur fyri lívi›. Vóru millum anna› á Kvinnurá›stevnu vi› Smyrli í Oslo saman vi› 160 konum úr Føroyum í 1988.

Skalt tú liva vi› lívstreytum sum Maria, uttan at gerast beisk, skalt tú vera naka› av einum lívslistarkonu. Umrá›andi er at duga at fáast vi› anna› enn ta›, i› tyngir sinni›. Hon fekk sær urtagar›, leg›i nógva orku í og fekk ein vakran hava, har hon eisini hev›i fingi› hagablómur at trívast væl. Hetta hev›i hon mikla gle›i av. Hon fylgdi vi› øllum tí, i› hendir í samfelagnum, og hon dugdi væl at síggja ta› skemtiliga og stuttliga, sum ofta er í gerandisdegnum – eisini í politikki. Ma›urin Klæmunt stilla›i í síni tí› upp vi› Sverra Paturson hjá Loysingarflokkinum. Maria og Klæmunt mundu vera á einari lei›, tá um samfelagsvi›urskifti ræ›ur. Tey vóru ikki sum hini í or›sins bestu meining, tey fóru ikki eftir løttum og grunnum loysnum. Gó› eyglei›ingarevni høvdu tey, og kundu tí siga nógv vi› fáum beinraknum or›um.

Maria mundi vera mitt í sjeytiárunum, tá hon seg›i, at nú høvdu øll børn hennara ta› gott, og at nú tordi hon vi› fri›i í sálini at leggja frá sær. Neyvan mundi hon seta seg afturá. Lyndi› var at geva og hava umsorgan fyri, og ta› hevur veri› kærkomi› og hent hjá barnabørnunum, i› gjørdust fa›irloysingar, á›renn tey fóru í skúla. Hon hev›i stóran t‡dning fyri tey í uppvøkstrinum, og nú hon er farin, er hon ein gó› fyrimynd.

Maria fekk eitt gott lívskvøld, har synirnir Virgar og Egil fjálga›u um hana á ein slíkan hátt, tú kundi unt øllum, sum gerast gomul. Hetta megna børn, i› eru kensluliga væl kálvfødd.

Fri›ur veri vi› minninum um Mariu Oknadal.

Argir, Allahalgannadag 2000
Karin Kjølbro

Sethúsaeigari, les hetta!



Bjarti Mohr
valevni hjá Fólkaflokkinum – listi A

Vit minnast øll at bygdi tú eini sethús so var møguligt at fáa ein rentufrádrátt í skattinum.

So bleiv rentufrádrátturin broyttur til rentustu›ul – ætlanin var at hetta skuldi ganga út uppá ta› sama.

Vit vóru mong sum longu tá varna›ust at so fór ikki at vera. Hetta fór at vera eitt hent tól hjá teimum sum vilja hava eitt høgt skattatr‡st. Hetta fór at vera byrjanin til eina avtøku ella minking av rentufrádrátt-inum. Hetta fór at vera byrjanin til at vanligar familjur ikki hava sama møguleika at byggja sær hús.

Ta› ver›ur pakka inn í ymiskt pappír vi› ymiskum etikettum: Men ætlanin er at rentustu›ulin skal minka longu í 2001 og uppaftur meira seinni: Hetta er ein umvegis skattahækkan sum ver›ur rættvísgjørd vi› at kalla hana meira sosiala og at handverkarar hava ov nógv arbei›i og tjena ov nógv – ta› er heilt fá ár sí›ani at handverkarar r‡mdu av landinum vegna arbei›sloysi, so lat teir fáa fri› – takk!

Í Dimmalætting 26. okt. er grein sum f‡list á at Húsalánsgrunnurin veitir vanligur føroyingum ov bílig húsalán tí ta› er kappingaravla›andi og Landskassin missir pening ver›ur sagt.

Fyri ta› fyrsta er ta› frí kapping á lánsmarkna›inum og eg kann ikki hugsa mær at Húsalánsgrunnurin ger naka› sum hann ikki kann standa inni fyri. Fyri ta› næsta eru ta› enn heilt nógvir sethúsaeigarar sum eru illa fyri fíggjarliga tí júst teirra sak ikki bleiv loyst á ein rímuligan hátt í kreppuárunum.

Fólkaflokkurin hevur altí› ávara ímóti ov høgum skattatr‡sti og vónandi lata sethúsaeigarar seg ikki draga uppá trá enn einafer›.

Alment innlit í Tórshavn

Johan Mortensen
Valevni hjá Tjó›veldisflokkinum



Ta› er áhugavert og ikki sørt tankavekjandi, at fyrsta uppgávan hjá Løgtingsins Umbo›smanni ver›ur at taka stø›u til eina klagu frá Sjónvarpi Føroya um tørvandi alment innlit hjá Tórshavnar Kommunu.

At so máli› sn‡r seg um Tórsvøll kann ikki undra nakran, spotti› í Gundadali.

Ta› skal ikki fyrikoma at ein fingur skal kunna setast á Fyrisitingina hjá B‡rá›num. Hon skal vir›a øll krøv um almennt innlit hvør so enn hevur slíkan fyrispurning. Hetta er ein lógarbundin skylda og eitt moralskt krav.

B‡rá›i› og Fyritisitingin eru fólksins tænarar.

Tjó›veldisflokkurin stu›lar fult og heilt almennum innliti.

SOV TÆR MEGI OG MÁTT
Heilsubótarmadrassin eitur MAGNETO-TEX
Linnar pínu, styrkir blóðrenslið og tú svevur sum steinurin.
Bið um fleiri upplýsingar
ÍSINKRAMM • AMBOÐ • SÚKKLUR
MÁLING • EL-LUTIR
D. J. ENNI
TVØROYRI
Tel. 371061 - 210061
Sosialurin - 311820

HUGNAKVØLD
– serliga ætlað eldri fólki
verður á Hotel Föroyum
Mikukvøldið 6. des. kl. 19.00
Á skránni
✻ 3-rættars matskrá:
Fersk súpan v/ heimabakaðum breyði
Lambasteik v/ grønmeti, eplum og sós
Kaffi/te og mandlurís v/ mandlu í
✻ Felagssangur -
har Fimmboði Lisberg samskipar borðhaldið
KABARETT við Grímu
FIMMBOÐI LISBERG & VINMENN spæla til dans
Tilmelding á tel. 31 75 00 • Kostnaður kr. 225,-
Øll eru vælkomin,
bæði bólkar og einstaklingar
Altíð vælkomin á
Hotel Föroyar
Tel. 317500
Best Western
Sosialurin - 311820